


## LANDSGRANNSKOÐANIN

søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir 2 starvsfólkum at byrja 1. mars 2008 ella eftir avtalu. Talan er um áhugaverd og fjølbroytt størv, ið fevna um at grannskoða almennar stovnar, skipanir og virkir. Til ber at laga arbeiðsuppgávur eftir førleika og áhuga.

**Førleikakrøv:**
Hægri útbúgving innan grannskoðan, roknskap, løgfrøði, kunningartøkni o.l., ella royndir innan almenna ella privata umsiting eru avgjørt fyrimunir, men eru ikki treytir.
Dentur verður lagdur á, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er arbeiðssamur, nærlagdur, dugir væl at skriva og samskifta við stovnar og starvsfólk, og kann vera við í fakligu menningini av arbeiðsgongdunum á Landsgrannskoðanini.

**Útbúgvingarmøguleikar:**
Á Landsgrannskoðanini leggja vit dent á at vera á høgum fakligum støði, og tí bjóða vit starvsfólki okkara útbúgving og eftirútbúgving. Vit eru við í mennandi samstarvi við størri grannskoðaravirki og við norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar, og starvsfólkunum stendur í boði at fara á skeið ella at arbeiða styttri tíðarskeið í hinum norðurlondunum.
Landsgrannskoðanin nýtir framkomna KT-hjálparskipan, sum lættir um arbeiðið og er við til at tryggja, at grannskoðanin fer fram á altjóða støði. Skipanin er løtt at brúka, og starvsfólk verða lærd upp at brúka skipanina.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum o.ø. skal sendast til:

Landsgrannskoðanina
Traðagøta 43
Postrúm 2053
165 Argir
ella sum teldupostur: postur@lg.fo.

Umsóknir skulu verða Landsgrannskoðanini í hendi í seinasta lagi 15. januar 2008. Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Beintu Dam, á telefon 355100. Fyrispurningar verða viðgjørdir í trúnaði.

Upplýsingar um Landsgrannskoðanina o.a. eru at finna á heimasíðu okkara: www.lg.fo.

LANDSGRANNSKOÐANIN er ein óheftur stovnur undir Løgtinginum, sum virkar sambært Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999" um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." Landsgrannskoðanin ansar eftir, at landsroknskapurin er rættur, at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar, at peningurin er brúktur samsvarandi galdandi játtanum, lógum og fyriskipanum, og at umsitingin er sparin og virkin. Landsgrannskoðarin er skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, og tí fyrireikar og avgreiðir Landsgrannskoðanin mál vegna løgtingsgrannskoðararnar, sum m.a. gjøgnumganga og leggja almennar roknskapir fyri Løgtingið at góðkenna.